**Nám X**
**Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 12/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum** (Yvirtøka av málsøkinum løgregla og ákærumyndugleiki)

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum**
(Yvirtøka av málsøkinum løgregla og ákærumyndugleiki)

**§ 1**
Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 26. mai 2011, verður § 1, stk. 2, nr. 11 strikað.

**§ 2**
Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2015.

**Viðmerkingar:**
Endamálið við lógaruppskotinum er at yvirtaka málsøkið "Løgregla og ákærumyndugleiki og atknýttu partarnar av revsirættarganginum".

Í § 2, stk. 2 í yvirtøkulógini (lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka) stendur, at føroyskir myndugleikar gera av, eftir tinging við danskar myndugleikar, nær hetta málsøkið kann verða yvirtikið.

Við hesum uppskoti yvirtaka føroyskir myndugleikar løgregluna. Føroyskir myndugleikar skulu tingast við danskar myndugleikar um ymisk praktisk viðurskifti áðrenn yvirtøkan kann verða framd. Tískil kemur henda løgtingslóg ikki í gildi fyrrenn 1. januar 2015.

Hugtakið "nærdemokrati" er altumfevnandi í einum samfelagi, og ein av uppgávunum hjá eini løgreglu er at fylla karmarnar út, ið løgtingið setur.

Tað er mest sannlíkt, at føroyska Løgtingið best kann seta fíggjarligar karmar fyri føroyska løgreglu og rættarskipan.

Yvirskipað er endamálið, at føroyingar yvirtaka øll mál og ráða í egnum landi.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Jákup A. Henriksen　Teitur J. Sigvardsen　Petur S. Thomsen

Boas H. Heinesen　Ronja Weihe　Knútur Jóannesarson

Sveinur M. Nolsøe　Vensil Djurhuus　Fríði Slættalíð

Linda Fosaa